LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

OPEL ASCONA 1.6
Ein Opel Ascona 1.6, árg. 86 til sølu sum eykalutir, 2.000 kr.
Tlf. 210398 ella 320545

CHEVROLET MONZA
Ein Chevrolet Monza persónbilur við bensinmotori árg. 89, til sølu fyri 9.000 kr.
Tlf. 444140

NISSAN KINGKAB
2,5 turbo diesel, árg. 1995, til sølu.
Tlf. 332295 ella 212395

TIL SØLU
Fýra felgur við píkadekkum 175/70 R14 1.500 kr.
Tlf. 312092

NISSAN PATROL
árg. 85, nýsýnaður til sølu.
Tlf 281032

YNSKIST
Fýra 14" píkadekk ynskjast til keyps.
Tlf. 221347

TIL SØLU
Fýra lítið brúkt Gislaved Nord Frost píkadekk, 165-80-13, til sølu.
Tlf. 221347

MITSUBISHI COLT
model 92, við donskum plátum, sera vælhildin, koyrt uml. 120.000 km í DK, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 456291
E-mail: v-gaard@post.olivant.fo

FIAT UNO
60 N, til sølu.
Tlf. 313784

TOYOTA HILUX 2 4D
til sølu, toppstykkið er brotið.
Tlf. 441238

EYKALUTIR TIL
Toyota Carina ST 171, árg. 88-91. Hurðar, bakrútur, síðurútar, startari, el rútavindara, drívaksil, tendring og spegl - H.
Tlf. 455843

NISSAN BLUEBIRD UII
Árg. 85, til sølu sum eykalutir, koyrir ikki.
Tlf. 444737, 282670, 223492

HONDA CIVIC 1,4
Sera væl útgjørdur bilur, Honda Civic 1,4 S frá sept. 95, sera væl hildin. Hevur nógva eykaútgerð: El-sóltak, el-spegl, el-rútar framman, 2x airbags, pover-steering, central lás og JVC Stereo. Bilurin hevur eisini: Alu-felgur V/ summardekkum og aðrar felgur við píkadekkum. Er rustviðgjørdur í novembur 2000, og sýndur í dec. 2000. Ring og hoyr nærri. Terje Vestergaard
Tlf. 447013

YNSKIST
Diesel motorur til Toyota Corolla, árg. 86, ynskist til keyps.
Tlf. 250750

OPEL ASCONA 1,6
Árg. 87, við skaða, verður seldur heilt bíliga. Kom og siggj. Nógvir eykalutir fylgja við.
Tlf. 375055

NISSAN BLUEBIRD
2000 motor og 15" sportsfelgur, sýnaður í ár, til sølu.
Tlf. 251721

TIL SØLU
Fýra felgur v/ heilársdekkum, 155/70-13, lítið brúkt, 1.500 kr. Kølari til Ford Fiesta, 500 kr.
Tlf. 315885

Arbeiði

REYKJAVÍK
Føroysk-íslendsk familia í Reykjavík við einum tvey ára dreingi vil fegin hava eina barngóða au pair-gentu (ikki-roykari). Drongurin skal ansast 4 tímar um dagin, annars er talan um lættari húsarbeiði.
Elin Svarrer Wang 003545522368

Barnaansing

Í KEYPMANNAHAVN
fyrst í komandi ári til juli. Vit søkja eftir eini gentu/konu til at ansa eftir lítla Tóri 30 tímar um vikuna. Lønin er sambart avtalu við Københavns Kommune. Ert tú áhugað ella kennur tú onkran sum kundi havt áhuga so kunna tit ringja til okkum á tlf. 38 34 33 99

Barnaútgerð

YNSKIST
Koyristólur við kalesju í góðum standi ynskist.
Tlf. 320325

Bátaútgerð

EKKOLOD – GPS
1 stk. ekkolod Eagle Supra I.D. Prísuppskot: kr. 2.500,-
Garmin GPS 45 (berbarur) og monterast, prísuppskot: kr. 3.000,-
Tlf. 287904 ella 212304

TIL SØLU
5 stk. BJ 5 el-snellur bíliga til sølu.
Tlf. 373302 - 214302

4-MANNAFAR
4-mannafar ella annar bátur um somu stødd, úr glastrevju, uttan motor, ynskist til keyps.
Tlf. 333325

Bøkur

ALFRØDI 1 OG 2
Er tað nakar, ið kann selja mær bøkurnar Alfrøði 1 og 2?
Tlf. 315385

NÓGVAR BØKUR
Frílesnaður, søga og romanir. Alt bíliga.
Tlf. 311915 og 220660

Burturm. /funnið

HEVUR NAKAR
funnið mína mappu, mist í SMS 22. des. koyrikort og onnur pappír í. Vinarliga ring
tlf. 333038 ella 223084

7 ÁRA GAMLA HALLA
hevði verið glað, um tann, sum tók 100 kr. úr einum brævbjálva, hon hevði mist á Varðagøtu hósdagin 28. des. setti seg í samband við hana á tlf. 312176 beinanvegin.

SVARTUR LEÐURJAKKI
Stødd XXL, av slagnum »Patino« burturblivin í TB-húsinum 9/12-2000. Hevur nakar funnið jakkan ella tikið hann av misgávum, ring til Jan.
Tlf. 251950
ella 373534

HARRAUR
burturmist í Klaksvík 16. des. Finningarløn verður givin.
Tlf. 457258

FUNNIÐ
Giftiringur funnin í FK í Hoyvík leygardagin 16. des. Eigarin biðist venda sær til skrivstovuna,
tlf. 314149.

FUNNIÐ
Oyrasnigil funnin í FK í Hoyvík. Eigarin biðist venda sær til skrivstovuna,
tlf. 314149.

FUNNIÐ
Í Keypssamtøkuni í Hoyvík er ein kvittan fyri eina Jamaica hurð (bók) úr Skemmuni funnin. Um eigarin vil hava hana, vend tær til skrivstovuna,
tlf. 314194.

Býli

LOFTSÍBÚÐ Á ARGJUM
til leigu. Íbúðin er uml. 80 kvm. stova/køkur, wc/brúsa + 3 kømur, leigan er 3.750,- kr. um mør. + el. 3 mør. dep.
Skriva til:
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
Bill.mrk. 318997

SETHÚS TIL SØLU
Eini eldri setthús á Eiði eru til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 423529
ella 252178

HÚS TIL SØLU
Raðhús í eysturbýnum til sølu. Boð undir 950.000,- ongan áhuga.
Tlf. 311441

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu frá 1. feb. 2001 til kvinnu fyrst í 40-unum.
Tlf. 254460

STÓRT VERILSI
til leigu v/ øllum hentleikum v/ atgongd til køk, bað, mynttelefon og vaskimaskinu. Leigari má ikki roykja. 5 min. gongd til Lærarasklan.
Tlf. 313799

ÍBÚÐ/HÚS YNSKJAST
til leigu í Havn í styttri tíð, helst møblerað.
Tlf. 311603

ÍBÚÐ Í KBH.
Ungur maður mitt í 20unum við føstum arbeiði søkir íbúð í Keypmannahavn. Alt hevur áhuga, eisini framleiga í styttri tíð.
Tlf. 441384 ella 35340605

KAMAR
til leigu.
Tlf. 319103

HÚS TIL LEIGU
Hús í Havn til leigu beinanvegin fyri 6.000 kr. um mør. u/ ljós og hita. Húsini eru 120 fermetrar og standa í friðarligum umhvørvi.
Tlf. 321166 - 250883
ella 250884

ÍBÚÐ TIL LEIGU Í HAVN
Uml. 50 kvm verður leigað fyri 3.500 kr. um mør. v/el og hita. Dep. 1 mør.
Tlf. 221021

ÍBÚÐ – KEYPMANNAHAVN
– JANUAR Vit sóknast eftir íbúð í Keypmannahavn í januar. Hanus Kamban,
Tlf. 38797172

Dýr

HUNDAHVØLPAR
Hey! Hvør vil eiga okkum? Vit eru fýra fittir hundahvøl.par av colli slagnum. Verða latnir til djóravin. Tygum frætta nærri við at ringja á tlf. 424277

KETTA
Kettlingur verður latin djóravini við at ringja. Hon er svørt og hvít, reinlig og sera fitt.
Tlf. 316813

KETTLINGAR
Tveir fittir, reinligir trílittir kettlingar verða latnir djóravinum. Kunnu fáast um eina viku.
Tlf. 315911

AKVARIUMSFISKAR
Akvarie fisk sælges billigt. Bl.a. perlegurami, Prinsessen af Burundi (Cichlide) og Metalpansermaller.
Tlf. 219194
ella 319194

Innbúgv

KØKSBORÐ TIL SØLU
Hvítt elipsuforma borð til stálbeinum til sølu. Prísur: 900 kr.
Tlf. 318887

HILLASYSTEM TIL SØLU
fyri 6000 kr. Nýprísur 14.000 kr. Mát: l. 3,18 hædd 1,80, dýpd 0,35. Tilfar: Massiv fura.
Tlf. 312578

SOVISOFA
Furu sovisofa, 140x200, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 313454

Pløgg

TVEY KAVASETT
buksur/jakki við hettu, reyð, std. 140 og 160, til sølu fyri 350 kr. settið. Eru ongantið brúkt.
Tlf. 310251

Súkklur

KNALLERT YNSKIST
Yamaha knallert í góðum standi ynskist til keyps.
Tlf. 333050
ella 211072

SUZUKI GSX 1100
til sølu.
Tlf. 211235

Teldur

FARTELDA BÍLIGA TIL SØLU
Toshiba 220CS, Pentium 133 MHz, 32 MB Ram, 1,4 GB Harddisk. Win 95 + Office 97, prísur: 3.900 kr.
Tlf. 320317 eftir kl. 17

MSI Geoforce 256
AGP, gott 3D kort til sølu. 5 mør. gamalt til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 422579

PLAYSTATION
við tveimum vanligum joystikum, eitt memery card og 15 spølum til sølu fyri prísuppskot kr. 3.000,00.
Tlf. 318120 aftaná kl. 18

EITT TELDUSPÆL
sum eitur The X-Files, til sølu fyri bert 200 kr.
Jákup - 316606

NINTENDO 64
við trimum joystickum og einum Super Mario spæli til sølu fyri 700 kr. Lítið brúkt.
Tlf. 311873

Tónleikur

JVC-HÁTALARAR
Tveir JVC hátalarar við fóti 120 watt, 8 OHM til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 312578

TIL SØLU
Sony anlegg + Jamo hátalarar. CD-spælari, forsterkari og tveir Jamo hátalarar, 140-200 W, 1 m. høgir, til sølu fyri bert. 4.800 kr.
Tlf. 215000

TVØRFLOYTA
Góð Yamaha tvørfloyta til sølu fyri 2.500 kr. Nýprísur uml. 8.000 kr.
Tlf. 332041

Ymiskt

SKOYTUR
Eigur nakar einar leðurskoytur, std. 33-35 í góðum stnadi til sølu ella láns? Vinarliga sig frá sum skjótast.
Tlf. 312176 (Gunna)

NOKIA 3210
fartelefon til sølu fyri 1.500 kr. Nýprísur 1.500 kr. Fartelefonin er 3 mør. gomul.
Tlf. 448423
ella 250831

AVÍSIR
Gamlar avísir frá 1920'unum og 40-50'unum.
Tlf. 321915
og 220660

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……..

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki

VIÐMERKINGAR

Politiið – føroyskt ella danskt???



Schandorff Vang
politistur

Tíðindi í Útvarpið Føroya tann 27. desembur vístu til eina limakanning – meiningsmáling – innan starvsfólkið í politinum í Føroyum – bert politistar, limir í Føroya Politistafelag, og ikki limir í øðrum feløgum, sum hava danskt løntar limir – fylgt upp við stuttum viðmerkingum frá Politistafelags formanninum og Høgna Hoydal landsstýrismanni, tó uttan at fara djúpari inn í málið.

Hvat er talan veruliga um?

Hví er henda meiningsmáling gjørd?

Upprunin til kanningina er Høgni Hoydal og hansara evindaliga trongd til at yvurtaka. Hann er komin við útsagnum fyri politisti um, at politiið skal yvirtakast sum skjótast og helst í hesi tingsetuni, tí er politiið fyrst yvurtikið »so hava vit maktina, tá vit aftur skulu samráðast við danir um aðrar yvurtøkur«. Henda óhugnaliga framlegging hevur so fingið limir í Føroya Politistafelag at órógvast og vilja hava fram, hvør støðan er millum limirnar í hesum máli.

Tað er eingin loyna, at politistar eisini hava politiska hugsan tvørtur um allar flokkar, men í hesi meiningsmáling vóru spurningarnir einfaldir og ikki, sum Høgni Hoydal vildi vera við – villleiðandi – á nakran hátt. Vit eru jú so von at hoyra Høgna Hoydal koma við slíkum útsagnum, tá meiningsmálingar ikki eru til hansara fyrimun.

Spurningarnir vóru tríggir – samansettir við umhugsni, júst so teir ikki skuldu verða villleiðandi:

1. **Eg eri fyri,** at politiið verður yvurtikið sum føroyskt málsøki.
2. **Eg eri ímóti,** at politiið verður yvurtikið sum føroyskt málsøki.
3. Eg veit ikki / Eg havi ikki tikið støðu.

Valluttøkan var 96%. Uttan brotpartar var úrslitið á leið hetta: 79% ímóti, 19% fyri og 4% vistu ikki/høvdu ikki tikið støðu.

Henda meiningsmáling vísir heilt greitt, hvat nevndin í Føroya Politistafelag eigur at hava í huganum – tí limirnir hava talað. Tað eigur ikki at blíva til, at minnilutin ræður (um tað skuldi verði minnilutin, sum nú fer at rópa harðast).

Tó so – verður serlig nevnd sett at arbeiða við hesum máli, so eigur politiið at vera væl umboðað í slíkari nevnd, og sjálvandi skal nevndin hava í huga meiningsmálingina, tá veljast skal, hvørjir politistar skulu í hesa nevnd.

Hví tað?

Tí – Høgni Hoydal hevði eina meting í útsøgn síni í Útvarpinum, at hann metti kostnaðin verða einar 45 milliónir. Í Sosialinum 29. desembur roknar hann við 63 millónum.

Hvar hevur hann hesi tøl frá og hví tvey ymisk tøl?

Eisini segði hann, at torført hevði verið at fáa til skjals nakrar upplýsingar frá donsku stjórnini, tí hevði hann sjálvur verið noyddur at kanna hetta.

Hvørjar kanningar hevur Høgni Hoydal gjørt?

Hvørjar eru keldurnar og hvussi álítandi og eftirfarandi eru tær?

Fundir hava eisini verið í Tinganesi millum Høgna Hoydal og Føroya Politistafelag, har hann sigur anda Politistafelagsins vera positivan.

Positivan fyri hvat,og er talan her um ein positivan meiriluta í nevndini – ella hvat meinar Høgni við?

Her vil eg skoyta uppí, at ikki allir limir í nevndini eru líka eldhugaðir í einstøkum málum. Egin áhugamál kunnu kanska skumpa útsagnir greiðari fram, enn hvat samd nevndin stendur fyri, og eigur hetta at vera tikið til eftirtektar og ikki sum grund fyri, hvat eitt heilt politistalið meinar.

Høgni Hoydal er eisini beinleiðis spurdur og skal hann hava svarað, at hann ongar útrokningar hevur, tølini eru bert leystliga mett, men hevur yvurtøkan skund.

Er hetta gott nokk at gera yvurtøkur við?

Hvar er ábyrgdin tá fyri hesum máli og Føroya fólki?

Eisini bar Høgni fram í útsøgn síni, at talan kom at blíva um fleiri leiðarastørv!!!

Hvar eru kanningarnar hesum viðvíkjandi og á hvørjum grundalag eru hesar útsagnir?

Er ikki nokk av leiðarum – ella kanska ov nógvir leiðarir longu í dag?

Ella hevur Høgni Hoydal longu nú aðrar ætlanir eftir eina yvirtøku?

Kann tað hugsast, at hann er so »framsíggin«, at hann longu hevur ætlan í skuffuni um samanlegging av politi, Vaktar- og Bjargingartænastu, Varðhaldi og møguliga bjargingarliðunum? Tað vil í øllum førum verða leiðaraniðurskurður, sum vanligt er við samanleggingum.

Eg spyrji bara – tí nógvar eru tungurnar,ið tala.

Hvat verður meirkostnaðurin at hava politiið føroyskt?

Vit vita øll, at í dag verður politiið í Føroyum rikið av dønum uttan um blokkstuðulin. Hetta er tískil eingin útreiðsla fyri landskassan, men heldur ein rein millióna inntøka í skatti á hvørjum ári.

Hvat sigur Føroya fólk til at fara frá einum reinum yvirskoti til eina meirútreiðslu fyri landskassan?

Tí eitt vita vit – politiið er ikki uttan kostnað í lønum, útbúgvingum, viðari menning og rakstri annars,og tá yvurtøkan hjá Høgna Hoydal er framd, verða tað skattakrónurnar hjá okkum øllum, sum skulu bera kostnaðin – strekkir tað ikki til sum er, so fer skatturin uttan ìva upp.

Hevur Føroya fólk áhuga fyri hægri skattaprosenti?

Hvar eru hinir politisku flokkarnir í hesum máli?

Eingin hevur hoyrt eitt orð til nakran annan politikara enn Høgna Hoydal í hesum máli, fyrr enn Útvarpið og Sosialurin tóka tað upp.

Jenis av Rana kemur stingandi upp og sigur tað m.a. »...vera týdningarmikið, at føroyingar reisa seg á føtur á so nógvum økjum, sum yvirhøvur gjørligt«. Hvat er hetta fyri møsn. Kunnu vit ikki standa á egnum fótum sum donsk løgregla í Føroyum?

Hinvegin sigur Sambandsflokkuring at »...felags løgregla er ein av grundleggjandi málunum í einum ríkisfelagsskapi« – og hara gevi eg flokkinum púra rætt.

Hví skulu vit fara úr donsku løgregluni og missa allar teir møguleikar, sum vit hava í dag? Talan er als ikki bert um sáttmálar, men so avgjørt um aðrar møguleikar, sum føroysk politifólk fara at missa – og tað fer at merkjast á tann hátt, at vit uttan iva verða sigld aftur úr, sum ikki einaferð.

Kann tað vera rætt, at Høgni Hoydal sleppur at hóreiggja sær sum hann vil í einum so týdningarmiklum máli sum hesum?

Eru hinir politikararnir ov dovnir til at síggja, hvatið fer fram, og hvat er rættast at gera í hesum máli???

Eg spyrji bara – og kundi eg gott hugsa mær fleiri almennar meiningar um hetta týdningamiklað mál – bæði frá politikarum og fólki kring landið.

Hvat siga øll hini danskt løntu, sum heilt avgjørt fara at fylgja við í hesi skilaleysu yvirtøku? Hvat er tykkara meining um hetta mál?

HEILSANIR

Góða Durita
Hjartaliga tillukku við 13 ára degnum nýggjársdag.
Ynskja pabba, Silja, Gilli og Jens-Rói

Góði Karstin
Hjartaliga tillukku við føðingardegnum tann 29.12.00.
Heilsan vit undir Heygnum 21

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**